

## Bowlinghøllin var karmurin

Hóast tað var sunnudagur, og hóast fleiri av fótbóltsfólkunum vóru nakað troytt eftir at punktum varð sett hjá ymsu feløgunum leygarkvøldið, so var talan um góða undirtøku til gallakvøldið, sum Sosialurin og Rás2 aftur í ár skipaðu fyri. Hesa ferð var karmurin Bowling-høllin á Hálsi í Havn, har Rás2 hevur havt studio teir 27 triðja hálvleikirnar, sum sendir eru í ár. Aftur hesa ferð var Heri Simonsen vertur við mikrofonina, og saman við restini av manningini hjá Rás2 syrgdi hann fyri, at føroyingar flest fingu við, hvør vann hvønn heiður. Og sjálv fótbóltsfólkini hugnaðu sær bara heilt væl teir tímarnar, sum tiltakið stóð við.

# Fróði er ársins spælari




Fróði Benjaminsen er fyri aðru ferð kosin ársins spælari í føroyskum fótbólti. Fyrru ferðina var í 2002, tá hann spældi við B68

Mynd: Álvur Haraldsen

**Leygardagin tók HB-liðformaðurin, Fróði Benjaminsen, ímóti FM-steypinum í Sørvági, og í gjárkvøldið var hann aftur steypamóttakari – hesa ferð sum ársins spælari hjá monnum**

Fróði Benjaminsen hevur verið frammi á føroyska fótbóltspallinum í mong ár, og hann hevur leingi verið ein av bestu føroysku spælarunum. Ikki minst hevur hetta sæst aftur í afturvaldi ferð eftir ferð til landsliðið, umframt at hann hevur verið sera sjónskur í heimligu




Hilmar Jan Hansen

kappingini.

Fyri sjey árum síðani, í 2002, tá hann spældi við barndómsfelagnum, B68, var Fróði kosin ársins spælari. Síðani hevur hann spælt við B36, har hann vann sítt fyrsta meistaraheiti, og nú hevur hann krýnt sína tíð í HB seinnu árini sum meistari í ár.

Heiðurin fekk Fróði Benjaminsen hesa ferð í kapping við ein annan HB-ara, Hans á Lag, og við Ahmed Keita í B68.

– Hetta er annan dagin á rað, at eg taki ímóti einum steypi, so tað er bara stuttligt. Eg eri fegin um heiðurin, tí øgiliga nógvir spælarar hava spælt væl í ár, segði Fróði, ið heldur ikki smæddist fyri at geva øðrum part av heiðrinum.

– Viðspælararnir hava sjálvandi øgiliga nógv at siga, og so hava vit eisini havt tveir øgiliga góðar venjarar, sum hava gjørt mína rollu á liðnum góða í ár. Og so leingi, tú sleppur undan skaðum, so kanst tú vísa meira, og í so máta havi eg verið øgiliga heppin í ár.

## Politiskt sjálvmál

**Sjálvandi skal politiski myndugleikin vera við, tá gerast skal av, um Føroyar ætla at hýsa Oyggjaleikunum ella ikki. Men sjálvmálið hjá Fíggjarnevndini hevur kanska forkomið hesum møguleikanum**



ÍTRÓTTARKLUMMAN

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fíggjarnevndin hjá løgtinginum mælti í farnu viku frá, at taka undir við uppskotinum frá Sjálvstýrisflokkinum um, at serstakur oyggjaleikagrunnur verður settur á stovn.

Grundgevinginum fyri støðuni var, at tað almenna sambært fíggjarnevndini ikki eigur at leggja seg út í, um og nær Oyggjaleikir skulu haldast í Føroyum.

Makan til slutur og vrøvl skal mann leita leingi eftir!

Sjálvandi er tað ein almenn uppgáva at standa fyri vertsskapinum av Oyggjaleikum. At siga hetta vera eina uppgávu hjá áhugafeløgum er einki annað enn undanførsla – ella í besta føri tekin um eitt vantandi forstáilsi fyri týdninginum, sum leikirnir hava.

Í høvuðsstaðnum hava tey skilt boðskapin, og setningurin hjá sitandi samgongu er, at Havnin í øllum førum skal vera til reiðar at taka sín part, um Føroyar skulu hýsa leikunum aftur.

Ítróttarliga prógvaðu úrslitini í Álandi, at vit ikki hava nakað sum helst at skammast um í oyggjaleikahøpi.

Boðskapurin frá løgmanni eftir leikirnar í Álandi tóktist eisini vera ein staðfesting av, at Føroyar sum samfelag eru til reiðar at átaka sær uppgávuna, men tann boðskapurin varð so dyggiliga skotin niður av samdu fíggjarnevndini.

Aðra staðni hava tey annars skilt, hvussu stórur týdningurin er av at hýsa stórum ítróttahendingum. Men samstundis vísti miseydnaða Obama-ferðin, sum varð skundað ígjøgnum í evstu løtu, hvussu stóran týdning tað hevur, at politiska skipanin er við – allan vegin. Í so máta kann fíggjarnevndin longu nú hava skotið eitt sjálvmál av teimum heilt stóru í føroysku royndunum at fáa leikirnar til Føroya.

Enn er sjálvandi tíð at broyta meining. Og vónandi verður hendan eisini broytt. Men at ein samd fíggjarnevnd staðfestir, at tað ikki er ein almenn uppgáva at hýsa leikunum, er við vissu eitt tað ringasta signalið, sum kundi verið sent til hini oyggjasamfeløgini. Og ilt er at síggja, hvussu hesi nú skulu halda, at Føroyar á nakran hátt eru til reiðar at hýsa leikunum.

# Heidi er ársins spælari

**Heidi Sevdal, sum hetta kappingarárið hevur spælt við Víkingi, var kosin ársins spælari hjá kvinnum annað árið á rað**

Tey, sum fylgja við føroyskum kvinnufótbólti, munnu helst øll ásanna, at tað, sum Heidi Sevdal ikki dugir við einum bólti, er neyvan vert at duga við bóltinum. Hon hevur framúr góð evni at krússa, umframt at hon hevur eitt gott skot – enntá úr langari frástøðu, um so skal vera.

Hon hevur sínar røtur í NSÍ, umframt at hon hevur spælt við B36 okkurt árið, og í ár hevur verið partur av bronsuliðnum hjá Víkingi. Kappingina um at gerast ársins spælari í ár, vann hon í kapping við teir báðar bestu málskjúttarnar í landskappingini, sum báðir eru úr KÍ: Rannvá B. Andreasen og Sofíu Purkhús.

– Eg hevði ikki roknað við, at eg fór at gerast ársins spælari í ár. Gamaní, vunnu vit bronsu í Víkingi, men vit lorkaðu tað eitt sindur burtur í byrjanini, so KÍ og AB sluppu avstað. Men seinni tóku vit tað aftur, tá vit vunnu stig frá báðum teimum fremstu liðunum, segði Heidi Sevdal, sum ikki var til staðar í Bowlinghøllini í Havn í gjárkvøldið, tí hon er stødd í Berlin, har hon er á námsferð í sambandi við skúlagongd sína.

Tí gjørdist tað lítlasystirin, Ansy, ið tók ímóti steypinum vegna Heidi, ið somuleiðis var errin av lítlysystrini, ið vann heiðurin sum ársins stjørnuskot. Tann heiðurin hevur Heidi vunnið áður, umframt at hetta er annað árið á rað, at hon verður kosin ársins spælari hjá kvinnum.

hil